**Human resource management**

“Human resource management” merkir starvsfólkafyrisiting; men hetta snýr seg um nógv annað enn fyrisiting. Hetta er ein grein innan fyri leiðslu, har ætlanin er at gera arbeiðsplássið til eitt stað sum finnur, fastheldur og mennir – og tá tað er neyðugt – loysir starvsfólk úr starvi á ein sømiligan hátt.

Í hesari lærugreinini kemur tú at kenna høvuðsástøðið og høvuðsháttalagið innan fyri ” human resource management”; hetta fer at gera teg føran fyri at finna tínar egnu mannagongdir innan fyri “human resource management” økið og økja tína fakligheit í HR-leiðslu.

**Innihald**

- Human resource management (HRM) úr einum strategiskum sjónarhorni
- Starvsfólkapolitikkur
- At menna og fasthalda starvsfólk
- Samtalan – hvussu kann hon fara fram
- HR–tiltøk - hvussu ger man - amboð og tilgongdir

Lærugreinin telur 10 ECTS og endar við, at tann lesandi skrivar sína egnu stuttu verkætlan, og so verður ein munnlig próvtøka hildin.

Lærugreinin “Human Resource Management” kann takast sum stakprógv; hon kann eisini innganga sum ein vallærugrein í einum samlaðum akademiprógvi.